# Orðblindni eingin forðing

**Kvøldskúlarnir siga frá sólskinssøgum, nú teir eru farnir at undirvísa orðblindum fólkum. Tað er gevandi fyri bæði lærara og næming, sigur Sølvi Andreasen, kvøldsskúlaleiðari og –lærari í Vági**

Randi Jacobsen



Seks kvøldskúlar hava síðan í heyst havt orðblindni sum lærugrein, og ein av hesum skúlum er í Vági.

~ Undirtøkan hevur verið hampilig. Vit hava undirvíst í tveimum bólkum, og flestu næmingarnir hava verið vaksin fólk, men onkur yngri fólk hava eisini víst áhuga. Fyri at kunna fara á kvøldskúla er aldursmarkið, Sølvi Andreasen, kvøldskúlaleiðari.

Hann er ein av lærarunum, sum hevur fingið serútbúgvingina og undirvísir saman við einum lærara av Tvøroyri.

### Tað ger góðan mun

Fysrt sum kvøldskúlin byrjaði, vóru næmingarnir eitt sindur varnir, men teir komu skjótt eftir, at her var hjálp at fáa.

- Sum lærari og undirvísari gleddist eg um at síggja, hvussu positivir næmingarnir vóru, tá ið teir skiltu, at tað gjørdi mun. Vit kundu jú vísa teimum á, at orðblindni ikki er nøkur forðing fyri útbúgvingum og víðari útbúgvingum, sigur Sølvi Andreasen.

Næmingarnir, sum hava lærugreinina orðblindni á kvøldskúlanum í Vági, hava ymiska bakgrund. Onkur gongur í skúla, og aðrir hava sjálvstøðugt arbeiði.

- Tann næmingurin, sum gongur í skúla, var til próvtøku í desember. Hann stúrdi eitt sindur fyri próvtøkuni, men hann dugdi skjótt at síggja, at tá ið hann fekk okkara hjálp og vegleiðing, fór tað at ganga. Hesin næmingurin fekk eisini góðan karakter til próvtøkuna, sigur Sølvi Andreasen.

Ein næmingur hevði hug at lesa til maskinmeistara, men hann sá seg ikki føran fyri at fara í skúla, tí hann var orðblindur. Men nú havav hevur gingið á kvøldskúlanum í nakrar mánaðir, hugsar hann av álvara um at gera dreym sín til veruleika.

- Eg kann bert siga, at hetta er sera spennandi og gevandi fyri báðar partar. Stuttligt er at síggja vónina lýsna í eygunum á fólki, sigur Sølvi Andreasen.



# Orðblind eru ofta klók fólk

**Fyrsta stigið fyri at fáa hjálp fyri orðblindni er at tora at tosa um tað, sigur Jónheðin Tróndheim, lærari á Tekniska skúlanum í Havn. Hansara royndir eru, at nógvir næmingar koma úr fólkaskúlanum og duga hvørki at lesa ella skriva. Øll teirra eru ikki orðblind**

Randi Jacobsen

Tað er kent á øllum tekniskum skúlum, bæði í Føroyum og uttanlands, at nøkur fólk hava tungt við at lesa og skriva, og summi eru orðblind.

Hesir veikleikar eru meira elle minni beinleiðis orsøkin til, at tey ungu fólkini hava valt at fara fakliga vegin heldur enn at fáa sær eina bókliga útbúgving.

Hetta sigur Jónheðin Tróndheim, sum seinastu árini hevur undirvíst á bildeildini á Tekniska Skúla í Havn.

Eisini handverkslærlingar hava nógv at skula lesa, og Jónheðin Tróndheim hevur mangan upplivað, hvussu nógvir lærlingar renna seg fastar. Nógv berja seg ígjøgnum ein tekst, men fáa einki við kortini.

### Illa statt millum lærlingar

- Ein kanning á bildeildini einaferð vísti, at fjórði hvør lærlingur hevði ilt við at lesa og skriva, og tað sigur ikki so lítið, sigur Jónheðin Tróndheim.

Skúlin ásannaði, at lesi- og skriviveikleikin hjá so nógvum næmingum var ein stórur trupulleiki, og so varð farið spakuliga at taka spurningin upp.

- Summi søgdu beinanvegin sjálv, at tey dugdu ikki at lesa og skriva, og teimum var lætt at royna at hjálpa. Men meginparturin av fólki roynir at krógva tað, helst tí tey skammast, og tá er verri at kunna staðfesta, um tey eru orðblind, skriviog lesiveik ella bara vantar undirvísing, sigur Jónheðin Tróndheim.



*Jónheðin Tróndheim hevur sum lærari á Tekniska skúla í Havn møtt nógvum læringum, sum eru komnir úr fólkaskúlanm, har teir onga hjálp hava fingið*

Hansara royndir eru, at heilt nógvir næmingar koma út úr fólkaskúlanum og hóast góð evni hava teir ikki lært at lesa og skriva.

Tað boðar ikki frá nóg góðari undirvísing í fólkaskúlanum.

Tekniski skúlin í Havn er ein av skúlunum, sum hevur sent lærarar í skúla at læra at undirvísa orðblindum næmingum fyri betur at kunna lofta teimum.

### Sig tað bara!

- Vit royna at tosa við næmingarnar og fáa teir at siga, sum er, og tað vísti seg, at nøkur aftrat tordu at siga tað, tá ið tey vóru fleiri í somu skóm. Tey skuldu bara hava hetta skumpið, sigur Jónheðin Tróndheim.

Tað liggur í okkum øllum, at vit royna at skáka okkum undan tí trupla. Men øllum ber ikki til at sleppa undan.

- Vit hava øll upplivað í fólkaskúlanum, at nøkur hava spælt hund av maktarloysi, men onnur hava lært at stríðast, og so eru tað tey, sum spakuliga koma eftir, at okkurt er galið. Men tað tekur tíð at koma til ta niðurstøðuna og tora at viðganga, at ein er orðblindur, sigur Jónheðin Tróndheim, sum hevur møtt fleiri lærlingum, sum hava verið álvarsliga orðblindir. Teir hava gingið níggju ár í fólkaskúlanum og hava onga hjálp fingið.

- Har kunnu vit ikki siga, at galið er við næminginum, heldur skúlanum, sigur Jónheðin Tróndheim.

### Peran í lagi

Hann veit, at fleiri orðblind fólk eru vitug. Heilt nógvir arkitektar eru orðblindir og tað sama við tónleikarum, listamálarum og øðrum listafólki.

- Eingin kann lastast fyri, at eitt fólk er orðblint. Hann ella hon skal bara tosa at viðurkenna tað, tí tá kann nakað gerast, sigur Jónheðin Tróndheim.

Tað hevru stóran týdning hjá skúlanum at duga at skilja ímillum orðblindni og tað bara ikki at duga at lesa og skriva. Hjá fleiri teirra, sum ikki duga at lesa og skriva men ikki eru orðblind, at foreldrini einki hava at lisið, og eingin hevur lisið við børnunum heima.

- Peran kann vera í fínasta lagi fyri tað, sigur Jónheðin Tróndheim.